# Minningargrunnur

## Dánjal Niclasen's

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2006 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's eiga at verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin, hin 10. august 2006.

Umsóknarblað fæst við at fara á heimasíðuna www.faroe.com ella heimasíðuna www.united.fo ella seta seg í samband við Faroe Seafood, tel. 35 55 55. Umsóknarblaðið skal sendast til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen's:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen's**
**c/o Faroe Seafood**
**Postboks 68**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Meinhard Jacobsen, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær **víðari útbúgving** innanfyri føroyska fiskivinnu. Í 2006 verða umsóknir um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's raðfestar á henda hátt:*

- *Serútbúgving í handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*
- *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
- *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
- *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*

Sosialurin 341800



## Leys størv

**Pedagogar til Býlingshúsið Norðasta Horn**

Tórshavnar kommuna søkir eftir einum pedagogi 35 tímar um vikuna og einum pedagogi 30 tímar um vikuna til Býlingshúsið Norðasta Horn.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. juli 2006.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Óla Midjord, stovnsleiðara, tlf. 210906.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

**Toll- og Skattstova Føroya**

# Starvsfólk til Fíggjarmálaráðið

Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum til Fíggjarmálaráðið at byrja 1. september 2006.

## Starvsfólk til móttøkuna

**Høvuðsuppgávur í móttøkuni eru:**
- at svara telefonunum hjá Fíggjarmálaráðnum, Gjaldstovuni, Hagstovuni og Toll- og Skattstovuni
- at avgreiða viðskiftafólki, sum koma í Fíggjarmálaráðið
- at svara fyrispurningum frá borgarum og virkjum, og senda skrivligt tilfar til borgarar og virkir
- at gera aðrar fyrifallandi uppgávur fyri stovnarnar í Fíggjarmálaráðnum

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava 9. floks prógv. Royndir frá líknandi starvi eru ein fyrimunur. Tað setti skal vera fyrikomandi, kundavinarligur og hava góðan málburð á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið er flokkað í 1. lf., og er fulltíðarstarv.

**Setanarøki**
Núverandi setanarøkið er Stýrið, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

## Reingerðarfólk

Vit søknast eftir einum reingerðarfólki til Fíggjarmálaráðið at arbeiða 20 tímar um vikuna.

Viðkomandi, ið settur verður, skal skal vera sjálvstøðugur og arbeiðssamur. Royndir frá líknandi starvi er ein fyrimunur.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

---

**Nærri frágreiðing um størvini**
Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Birgit Hansen á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

**11. august 2006 kl. 12.00.**

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postrúm 2151
FO-165 Argir

Merk brævbjálvan: "Umsókn"

Í Fíggjarmálaráðnum húsast sjálvt Fíggjarmálaráðið, Føroya Gjaldstova, Hagstova Føroya og Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Í Fíggjarmálaráðnum starvast 90 fólk.

Í deildunum hjá Toll- og Skattstovuni kring landið starvast 110 fólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

E-mail:

tollskatt@tollskatt.fo

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Hús til leigu

Sór sethús í Hoyvík til leigu. Til samans 179 fermetrar.
Grundøki 1060 fermetrar, liggja við høvuðsveg.
Kostnaður 8.000 kr um mánaðin uttan ljós og hita.

***Tel 584107***

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo